# BØNARLØTAN

FEBRUAR 2023 38. árg.

## *1. Mikudagur* *Es. 26.1-21*



*Summarlega við Ástjörn*

**ÍSLAND, Ástjörn**
Okkum tørvar fleiri trúgvandi starvsfólk til legurnar í ár.
6-12 ár: 1. lega 22/6-2/7; 2. lega 6-14/7; 3. lega 20-28/7.
13-15 ár: 4. lega 2-9/8 (ungdómsvika).
Opið hús leygardagin 15. juli.
Biðið, at Harrin signar verkið og sendir leguluttakarar, starvsfólk og alt, sum tørvar. Upplýsing: astjorn@gmail.com

**Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð**

## USA, New Tribes Mission, Alabama
## Judy og Óli á Grømma Jacobsen



1. feb. fara vit til Jakarta at hitta leiðsluna, sum umboðar NTM í Indonesia. Fundurin, sum hevur stóran týdning, er nógv seinkaður av koronu. 6. feb. vitja vit tveir dagar í Manila. Biðið fyri arbeiði okkara í Asia, og sum vit tala Guds Orð.

## KRINGVARPIÐ

5. feb. útvarpsmøti úr Gøtu við Siloa, Filadelfia og Hebron
5. feb. Sjónvarpsandakt, Niels Pauli Nónstein
12. feb. sjónvarpsmøti, Hebron, Argir

## EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld kl. 21.00. Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskvøld kl. 21.00. Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

***2. Hósdagur*** ***Sálm. 66***

## DANMARK, Kristnastova
## Sólva og Jákup Hansen



Møti eru sunnud. kl. 11 og fríggjakv. kl. 20. Biðið fyri barnafamiljunum í samkomuni og fyri sunnudagsskúlanum. Biðið fyri húsbólkunum og leiðarum teirra, umframt fyri okkum, at vit fáa vísdóm og orku til hirðaarbeiðið.

**Susan og Øssur Berghamar**
Minnist tænastuna, ið regluliga fer fram millum fólk í sjúkra-ørindum, eisini við fráboðan. Gott um tit eisini kunnu hugsa um Susan, sum hevur havt onkrar heilsuligar avbjóðingar í seinastuni. berghamar@kristnastova.dk

## *3. Fríggjadagur* — *1. Kor. 14.1-20*

**ZAREPTA**
Biðið fyri vetrarlegunum umframt umvælingum og nýgerð bæði inni og úti.

## *4. Leygardagur* — *Es. 27.1-13*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 13**
Vit eru fallin væl til aftur í Dakar. Marion vitjar í einum ættarbólki í Guinea fyrst í feb., har hon vegleiðir í at læra mál. Vónandi verður eisini vitjað í Tarensa. Biðið fyri ferðini og fyri vitjanini.



**FØROYAR**
- **Dora og Niels Pauli Nónstein**
  **Sigrid 15, Andreas 13, Kristina 11**
- **Else og Poul Johan Djurhuus**
- **Anna Maria og Rógvi Joensen**
- **Khuldah og Sámal Mikkelsen**
  **Josva 13, Ester 12, Samuel 8**

## *5. Sunnudagur* *1. Kor. 14.21-40*

**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**



6-11. feb. er Simon í Týsklandi og undirvísir á ECM skeiði fyri nýggjar trúboðarar. Seinni í feb. vitjar hann í Irpin í Ukraina. ECM hjálpir við at útvega hús til nøkur teirra, ið hava mist bústað sín í krígnum. Simon hevur eftirlit við hesum arbeiði. Biðið um varðveitslu og signing. European Christian Mission: www.ecmi.org/en/ukraine-crisis

## *6. Mánadagur* *Es. 28.1-29*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**



Vit hava tikið meginpartin av Markus upp, íroknað Jesu rødd og frásøgufólkið, og verða vónandi liðug í feb. Biðið fyri upptøkufólkunum, ritstjóra og fyri útgávuni.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 16, Emma Grace 15, Jónatan 13, Markus 10, Evita 7, Joy 6**

## *7. Týsdagur* *1. Kor. 15.1-19*

### PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)
### Carol og Poul Joensen



Minnist Carol, sum saman við øðrum fyrireikar árligu ungdómsstevnuna REACH í mars. Poul skal undirvísa um bíbliuumseting á bíbliuskúlanum í mars. Biðið um vísdóm. Í apríl er ætlanin at fara til PNG, og í tí sambandi er nógv at gera.

### TEILAND, Chiang Mai
### Corine og Sørin Joensen
### Eli 18, Aron 11, Noah Kristian 9

Nú Eli er 18, ætlar hann at flyta til Hollands, har hann kannar ymisk skúlatilboð. Biðið fyri honum og hesi stóru broyting í lívi hansara.

*Í dag fyllir Eli Joensen 18 ár

## *8. Mikudagur* *Es. 29.1-14*

### FØROYAR
### Shamila og Høgni Johannesen

Vit leggja nú videobrot út á STEVN-heimasíðuna. Biðið fyri okkara tænastu á netinum. Síður, bólkar og annað náa út til fólk í túsundatali um dagin í løtuni, men biðið eisini, at tænastan verður vard ímóti mótstøðufólkum og sensuri. Biðið fyri Joy, sum í løtuni er í Pakistan.

## 9. Hósdagur — Sálm. 67.1-68.12

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

Sambært Open Doors verða kristin atsøkt í Iran og Afghanistan, men kortini leggjast fólk aftrat samkomuni har. Vit byrja fyrsta online-skeiðið 9. feb. Undirvíst verður á farsi við enskum tulki í 8 vikur. Biðið fyri átakinum, lurtarum og samkomunum har.

## 10. Fríggjadagur — 1. Kor. 15.20-38

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**



Augustin skal giftast við Samiru 11. feb. Gud hevur við henni givið Augustin ein hjúnafelaga, ið elskar Jesus og ynskir at tæna eins og hann. Vit gleðast saman við teimum. Biðið Harran signa tey. Augustin heldur á at umseta Bíbliuna restina av árinum.



**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 12, Tabita 9,**
**Debora 7, Natan 4**

## *11. Leygardagur* *Es. 30.1-19*

**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Vit hava nú gjøgnumgingið kap. 1-3 av Jóh. Tilfarið verður so sent til bíbliuráðgeva til góðkenningar. Ein ungur vil doypast. Lova Harranum!

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

Um gott ár eru fjøruti ár síðani, vit byrjaðu verkið her í Odense. Tað ætla vit at hátíðarhalda. Biðið, at Harrin leiðir fólk til okkara.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

## *12. Sunnudagur* *1. Kor. 15.39-58*

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 17, Rebekah 15, Lydia 12**

Vit takka fyri tíðina heima. Vit vegleiða einum OM-London toymi at finna stuðlar. Tey hava fingið fleiri nýggj starvsfólk, bæði frá muslimskum londum og úr Landsynningsasia. Biðið fyri hesum toymi, at Gud leiðir tey at boða evangeliið fyri mongu tjóðflokkunum í London.



Biðið um vísdóm, so eg býti tíðina rætt ímillum OM og at skriva handbókina til nýggjar trúboðarar.

## *13. Mánadagur* — *Es. 30.20-33*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**



Fólkatalið á bygdunum minkar alsamt, og hetta ávirkar luttakaratalið á legunum. Vit umhugsa at taka 3 tær sunnastu bygdirnar við, men frástøða og ísur eru ein avbjóðing. Á bygdunum er eingin sunnudagsskúli ella annað líknandi.

**GRØNLAND**
**Juvel II**

## *14. Týsdagur* — *1. Kor. 16.1-24*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**



*Outreach* verður nýggj lega í Nuuk fyri fólk í samkomuni, sum t.d. ikki fáa feriu at koma á aðrar legur, og fyri tey ungu. Legan verður 23-31. juli.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**



Vit hava nú eftir 2 mán. fingið stað at búgva. Vit flyta inn saman við mammu Daniel, sum er 94 ára gomul. Eftir umbøn hava vit bíbliutímar yvir netið fyri fólki í Qasigiannguit.

*Í dag fyllir Aron Joensen 11 ár

## *15. Mikudagur* *Es. 31.1-9*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**

Eftir farloyvið fóru Birita og John Timothy aftur til Japan í jan. og flyta norður til Sapporo at arbeiða í eini samkomu har. Biðið, at Gud leiðir og varðveitir, so tey náa út til japanar í Sapporo.

Logos Hope er í Jordan. Eik Klæmintsdóttir, Leirvík, er á 3 mán. STEP-programmi umborð síðani jan., og Esther Dam Hansen er framvegis við. Martin og Siri í Grund eru komin heim aftur, eftir at hava verið umborð í nakrar mánaðir.

**FØROYAR**



**- Elin og Jógvan Jacobsen**
**- Unn og Jógvan Zachariassen**
**- Lis Zachariassen**
**- Annika og Poul Færø**
**- Anna og Óli Steinberg**
**- Maria og Jens Bech**

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

## *16. Hósdagur* — *Sálm. 68.13-36*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

Nýtt skúlaár er byrjað her, og vit hava fingið nøkur nýggj børn í frítíðarskúlan. Biðið, at tey falla væl til, og at sáðið, ið verður sáað, fellur í góða jørð. Vit eru ikki væl mannað í ár, so vilt tú hjálpa, fært tú upplýsingar frá OM ella við at skriva til tanja.abrahams@om.org



**FØROYAR**
**- Birgit og Svenning av Lofti**
**- Atlantic Mission, Juvel II**
**- Rutt og John í Skemmuni**
**- Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**- Vanja og Svein í Prestgarði, Svend 14, Terji 10, Petra 9**

## *17. Fríggjadagur* — *1. Tess. 1.1-10*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Samkoman veksur støðugt, og vit hava nógv um at vera, bæði við at hjálpa fólki at vaksa andaliga og við uppíbygging av samkomubygninginum. Biðið saman við okkum um styrki og vísdóm at kenna og fylgja Guds ætlan í øllum, vit gera.

## *18. Leygardagur* *1. Mós. 25.19-34*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 10, Emma 6**



Minnist ungdómsarbeiðið í samkomuni; 8-10 ung fólk koma fast saman. Biðið fyri Daniele, einum ungum manni í samkomuni, sum leiðir ungdómsarbeiðið.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 9, Micah 9**

Vit takka Harranum fyri trúfesti í farna ári. Hann leiddi røttu fólk á okkara leið í rættari tíð. Vit biðja, at fleiri verða doypt í nýggja árinum.

## *19. Sunnudagur* *1. Tess. 2.1-20*

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**



20-22. feb. verði eg á nevndarfundi um trygd fyri trúboðarar, sum virka við NTM. Nógvar rembingar eru kring heimin, ið ávirka trúboðaraarbeiðið. Sonur okkara Caleb giftist við Joy fyrst í jan. Biðið fyri teimum.

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**




Mamma Stephen andaðist í des., so vit eru í Onglandi í løtuni. Vit fara til Turkalands í mars/apr. Bíbliubrævskeiðnum gongur væl, og mong fáa Nýggja Testamenti og bøkur hvørja viku. Takk fyri forbøn.

***20. Mánadagur*** ***1. Mós. 26.1-17***

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 2**

Krissy skal eiga um hálvan feb. Vit eru byrjað eina tilgongd um ættleiðing og vóna skjótt at verða góðkend. Vit flyta skjótt til oynna Papua, men vita enn ikki nær. Biðið um hjálp og signing.

***21. Týsdagur*** ***1. Tess. 3.1-13***

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 5, Timon 3**

Vit fara til Kovol í apríl. Í USA hava vit kunnað um tænastuna í Kovol og vóna, at hetta eggjar fleiri til betri samband við Kristus.

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 12, Leah 9, Abigail 4**

## *22. Mikudagur* *1. Mós. 26.18-35*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 11**



Biðið, at Gud sendir fleiri trúboðarar út í heimin. *Skurðurin er stórur, men arbeiðsmenninir eru fáir; biðið tí Harra skurðarins senda út arbeiðsmenn til skurð Sín! Lukas 10,2.*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit fyrireika árligu missiónsstevnuna, sum verður síðst í feb. Biðið, at fólk gleðast og verða uppbygd í trúnni, meðan tey eru her.

## *23. Hósdagur* *Sálm. 69*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Biðið fyri trúboðarunum, sum eru millum molbogfólkið. Ein teirra, Lailyn Diaz, hevur havt nógvar heilsutrupulleikar síðstu tíðina.

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 14, Noah 13, Karis 9, Judah 7, Ethan 5**

## *24. Fríggjadagur* *1. Tess. 4.1-18*

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 6, Jude 4, Evelyn 2**

Vit fluttu til Papua Nýgunea í jan. og byrja nú eina 6 mán. langa tilgongd, har vit læra mál og mentan. Biðið, at børnini og vit falla væl til og skjótt læra málið og mentanina, og at Harran leiðir og styrkir okkum.

## *25. Leygardagur* *1. Mós. 27.1-29*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Bíbliutímarnir eru byrjaðir, og vit gjøgnumganga nú 2. Kor., 2. Tim., Fil. og Filemon. Eg geri nú Matt. klárt at prenta.



**VENESUELA,**
**Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *26. Sunnudagur* *1. Tess. 5.1-28*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 16, Lydia 5**

Vit síggja fleiri nýggj andlit í samkomuni úr eitt nú India, Týsklandi, Kamerun og Sambia. Vit granska nú Jeremias. Biðið, at Harrin signar boðskapin, og at vit fáa tey nýggju at føla seg heima hjá okkum.

*Í dag fyllir Elizabeth Niclasen 17 ár

## *27. Mánadagur* *1. Mós. 27.30-46*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 13, Nana 11, Louie 9, Rio 3**
Eftir nýggjár byrjaði nýggjur bíbliutími í samkomuni, har Hallur undirvísir. Biðið um Guds leiðslu og signing.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Rebekka 17, Hanna 14**



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen.**

*Í dag fyllir Rebekah Niclasen 15 ár

Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

## NÝGGJ BÓK!

**64 síður 150 kr.**

Sandvíkingurin Jóhan Eli Poulsen hevur siglt, verið tingmaður og hevur verið bundin av alkoholi. Yrkingarnar nema við øll lívsins viðurskifti, so sum politikk, mentan, náttúru og ikki minst trúgv. Helvtin av ágóðanum av søluni fer til Blákrossheimið, og hin helvtin fer til annað vælgerandi endamál.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo